**Skúlastýrisfundur**

Dagfesting: 17.01.2017

Kl: 17:15–20:00

Til staðar: Sunrit Niklasdóttir, Nelly Debes Christiansen, Marjun Danielsen, Ragnar Isaksen, Vivi Davidsen, Súsanna Mortensen og Høgni Warberg

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1: Præsentatiónsrunda

2. Kunning um skúlastýrið

3. Skipan av skúlastýrinum

4. Evnisdagur um skúlastýrisarbeiði 21. januar kl. 13-16

5. Ymiskt

Att 1: Vit høvdu eina præsentatiónsrundu, har vit stutt præsenteraðu okkum fyri hvør øðrum.

Att: 2: Høgni kunnaði stutt um skúlastýrið og útflýggjaði skjøl um skúlastýrið, har tað eina var 'Rundskriv um meginreglur fyri skúlastýri' og hitt var 'Heimildir hjá skúlastýrinum'. Høgni kunnaði eisini um, at frágreiðingarnar frá øllum skúlastýrisfundunum síðan 2012 eru at finna á heimasíðu skúlans.

Att 3: Nýggja skúlastýrið skipaði seg við Sunrit Niklasdóttir sum forkvinnu, og Nelly Debes Christiansen sum næstforkvinnu. Harumframt er Marjun Danielsen, foreldraumboð. Ragnar Isaksen og Vivi Davidsen kommunuumboð, Súsanna Mortensen læraraumboð og Høgni Warberg, leiðsluumboð. Skúlaleiðarin er fastur skrivari í skúlastýrinum.

Att 4: Høgni kunnaði um ein Evnisdag um skúlastýrisarbeiði, sum skuldi verða í Læraraskúlahøllini í Havn leygardagin 21. januar frá kl. 13:00-16:00. Sunrit, Nelly, Marjun og Ragnar ætla at fara til evnisdagin, og Súsanna sigur, at hon møguliga kann eisini kann fara til evnisdagin. Í hesum sambandi tosaðu vit um, hvørvítt tað er rætt, at skúlastýrislimir eiga at fáa koyripengar og fundarpengar fyri at luttaka á slíkum evnisdøgum/fundum. Ragnar og Høgni fara at leggja henda fyrispurning fyri kommununa.

Att 5: Vit skiftu orð um ymiskt. Vit avtalaðu næsta skúlastýrisfund til at verða mikudagin 8. mars kl. 16, og síðan at hava skúlastýrisfund aftur mikudagin 31. mai kl. 16. Harumframt er eisini avtala at hava fund við Vestmanna skúlastýrið mikukvøldið 27. sept. kl. 17:15 í Vestmanna skúla. Vit endaðu við eini rundvísing í skúlanum

Vegna skúlastýrið
Høgni Warberg, skrivari